# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1004.
# Tíðarskeið: 24/02-10/03 - 2010

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Kristian Zachariassen, Lis Larsen, Rógvi Mouritsen (fyrru helvt av túrinum), og Jens Arni Thomassen (seinnu helvt av túrinum). Tóri Hentze Thomsen var við sum praktikantur.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Vit tóku prøvar av toski til genetiskar kanningar, sum Petra Petersen, Fiskaaling, stendur fyri. Hitin í trolinum varð skrásettur við miniloggarum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Vit fóru út fríggjakvøldið 26/2 á midnátt og byrjaðu á Suðuroyarbankanum. Tóku støðir eystanfyri til mikudagin 3/3, tá vit fóru inn á Havnina at skifta fólk og umvæla eina vekt. Vit landaðu ikki fyrr enn túrurin var liðugur. Fóru síðan eystrurum at taka tær støðirnar, sum manglaðu í. Endaðu túrin við at taka støðir norðan fyri Føroyar. Veðrið var sum heild gott. Vit tóku 61 støðir.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 16. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 15. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var nógv minni at fáa av toski enn í fjør, tí tað góða hálið norður úr Risanum gav bert 7,3 tons í ár mótvegis 18 tons í fjør, sí annars Talvu 1. Toskurin var væl fyri, og væl av nebbasild var í fiskamagum. Sera lítið var at fáa av svartkjafti, men nógv av hvítingsbróðri. Vit fingu ein merktan tosk. Ein fullfíggjað samanbering við 2009 fæst, tá komandi túrur (1006) er liðugur.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1004 (fyrra helvt av yvirlitstrolingini í mars 2010).

| FISKASLAG | KG í 61 støðum | Nytrur | Magar | KG í 63 støðum í fjør | KG per støð í 2010 / KG per støð í 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 11968.37 | | | 8711.93 | 1.33 |
| TOSKUR | 10124.04 | 734 | 148 | 22666.48 | 0.43 |
| UPSI | 7591.04 | 613 | 122 | 13399.81 | 0.55 |
| GULLLAKSUR | 3431.78 | | | 2585.30 | 1.29 |
| HÝSA | 3154.73 | 634 | 138 | 3996.94 | 0.76 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 2403.26 | | | 2350.02 | 0.99 |
| LONGA | 1020.99 | | | 763.58 | 1.29 |
| HVÍTINGUR | 481.52 | | | 695.91 | 0.67 |
| SILVURMURTUR | 477.86 | | | 1592.05 | 0.29 |
| BROSMA | 354.73 | | | 316.44 | 1.09 |
| REYÐSPRØKA | 345.40 | | | 412.17 | 0.81 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 269.48 | | | 479.17 | 0.54 |
| SVARTKJAFTUR | 203.95 | 50 | | 826.14 | 0.24 |
| SKRAMBUL | 202.35 | | | 101.15 | 1.94 |
| KNURRHANI | 186.58 | | | 264.28 | 0.68 |
| BLÁLONGA | 174.52 | | | 210.61 | 0.80 |
| KALVI | 168.84 | 1 | 1 | 39.29 | 4.16 |
| TUNGA | 147.77 | | | 119.04 | 1.20 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 102.49 | | | 4.79 | 20.72 |
| SANDSPRØKA | 78.14 | | | 72.89 | 1.04 |
| HVASSASPREK | 70.00 | | | 22.75 | 2.98 |
| HAVTASKA | 67.14 | 15 | | 59.58 | 1.09 |
| LOLIGO | 63.76 | | | 177.94 | 0.35 |
| TRANTKONGAFISKUR | 55.00 | | | 72.16 | 0.74 |
| ROGNKELSI | 53.34 | | | 55.43 | 0.93 |
| HAVMÚS | 50.20 | | | 1.86 | 26.20 |
| TINDASKØTA | 41.26 | | | 4.38 | 9.12 |
| GLASKVOYSA | 28.66 | | | 0.00 | |
| SVARTKALVI | 16.60 | | | 12.77 | 1.26 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 13.77 | | | 10.15 | 1.31 |
| STEINBÍTUR | 10.36 | | | 14.83 | 0.68 |
| LÁLLA | 6.63 | | | 0.82 | 7.87 |
| LIRI | 6.05 | | | 7.88 | 0.74 |
| SILD | 1.71 | | | 14.35 | 0.12 |
| VATNHØGGUSLOKKUR | 1.40 | | | 0.00 | |
| TRØLLAKRABBI | 1.26 | | | 0.00 | |
| ROSSAMAKRELUR | 0.78 | | | 0.00 | |
| MAKRELUR | 0.42 | | | 5.88 | 0.07 |
| NEBBASILD | 0.27 | | | 3.98 | 0.07 |
| ELEDONE | 0.26 | | | 0.00 | |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.26 | | | 0.00 | |
| GLÝSUFISKUR | 0.17 | | | 2.12 | 0.08 |
| NORSKAKVOYSA | 0.02 | | | 0.00 | |
| LAKSSILD | 0.00 | | | 0.12 | 0.01 |
| TILSAMANS | 43377.17 | 2047 | 409 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1004d.doc.

Petur Steingrund